# Sangkapping til frama fyri brekað

*Nú verður skipað fyri sang- og lagakapping, har fyrsta virðisløn er 10.000 krónur. Endamálið er at skapa betri fatan av teim brekaðu og teirra brekum og trupulleikunum, ið tey avvarðandi dragast við*

DAGFINN OLSEN

Ein áhugabólkur, ið partvís er samansettur av foreldrum at brekaðum, hevur tikið stig til sangkapping við fløguútgávu fyri eyga.

Øll kunnu vera við í kappingini og senda inn kasettuband við sangi og guitari ella klaveri, umframt at sangteksturin skal vera við.

Øll eru vælkomin at senda inn. Eisini, um ein kanska bert hevur eina yrking liggjandi, ið er viðkomandi. Einasta listarliga krav er, at samsvar er millum orð og lag og at lagið fellur nøkulunda væl í oyruni.

Stórt frælsi verður eisini givið til orðavalið, men endamálið við útgávuni skal helst havast í huga.



*Stigtakararnir til sangkappingina skiapðu í gjár fyri tíðindafundi. Jóhannus á Rógvu Joensen tekur sær av tí tónlistarliga. Lis og Jóhan í Niðristovu og Sigrið Sivertsen, stigtakarar og foreldur. Bartal Kass frá Føroya Lívstrygging, sum er einsamallur høvuðsstuðul og Hilmar Jan Hansen, ið tekur sær av samskifti og øðrum* Mynd Jens Kristian Vang

### Endamálið

Endamálið er at skapa eina betri fatan av brekaðum og teirra brekum. Og ikki minst teimum trupulleikum, sum tey avvarðandi ofta dragast við. Mett verður, at fyrsta árið í nýggja túsundárinum er upplagdur møguleiki at gera vart við, at øll eiga at betra umstøður teirra brekaðu. Tað eigur at vera náttúrligt hjá teimum at fáa virðiligt lív.

Fløguútgávan hevur einki vinnuligt endamál í sjálvum sær, men stigtakararnir vóna, at hervið verður gongd sett á at betra umstøður teirra brekaðu. Eisini vóna tey, at fáa í lag kjak um hetta.

- Endamálið er upplýsing. Ikki samkensla, men forstáilsi og viðurkenning, sigur Sigrið Sivertsen, stigtakari og foreldur.

Hon heldur, at umstøðurnar eru nógv broyttar seinnu árini. Men hóast nógv er gjørt, so er eisini nógv tosað og stundin er komin at gera okkurt ítøkiligt.

- Sangur og tónleikur talar til hjørtuni hjá øllum, sigur Sigrið.

### Hugskotið

Hugskotið til tiltakið kom við samrøðu millum Sigrið Sivertsen og tónleikaran og framleiðaran Jóhannus á Rógvu Joensen. Tey vendu sær síðani til Lis og Jóhan í Niðristovu, foreldur , og til Hilmar Jan Hansen, ið tekur sær av praktiskum uppgávum, so sum samskiftinum við fjølmiðlar og annað.

Hesi hittust 28. november 1999 til fyrsta fyrireikandi fundin, har samtykt varð at seta tiltakið í verk

### LÍV stuðlar

Fløguútgáva er kostnaðarmikil. Heitt varð á Føroya Lívstrygging um at vera við sum stuðul. Stigtakararnir eru takksamir fyri stóru vælvildina frá Føroya Lívstrygging, sumer einsamallur høvuðsstuðul fyri tiltakinum.

Stuðulsjáttanin er so rúmlig, at yvirskotið av útgávuni fer beinleiðis til viðkomandi endamál. Gjørt er av at lata avlopið til MBF (Meginfelag teirra brekaðu í Føroyum) og ÍSB (Ítróttarsamband Føroya).

Bartal Kass frá LÍV sigur, at endamálið er sera viðkomandi fyri tey, tí einum nýtist ikki at vera føddur við breki, men kann fáa tað. Tað eru eisini kundar hjá LÍV, sum hava livað virkið lív, men sum fáa brek og mugu liva við tí.

### Tung skipan

Hilmar Jan Hansen sigur, at tað, sum eisini hevur koyrt undir hesa ætlanina eru umstøðurnar, sum foreldur at brekaðum koma í. Eigur ein brekað barn, so kemur ein í eina skipan, har ein skal berjast fyri síni søk.

- Tað kann vera líka stórur trupulleiki, sum tað at eiga brekað barn, sigur Hilmar Jan.

- Tað er næstan verri at læra at liva við skipanini, enn við brekinum, sigur Sigrið.

### Treytirnar

Útgávan leitar ikki eftir samkenslu ella grunnari viðgerð av tí at hava eitt brek. Dentur skal helst leggjast á tað positiva og lívsjáttandi, uttan at hetta gerst »yvirfladiskt«, siga fyrireikararnir.

Arbeiðsheitið á ætlanini er Vælskapt Brek. Orðini segði Finnur Helmsdal á eini legu fyri mongum árum síðani. Orðini eru komin framaftur, nú fundast hevur verið um fløguútgávuna.

- Ofta verður sagt, at tey hava fingið eitt vælskapt barn. Hevur barnið brek, verður sagt, at tað er synd í teimum, tí tey hava fingið brekað barn. Men øll eru skapt í Guðs mynd og eru vælskapt. So einfalt er tað, sigur Sigrið um arbeiðsheitið.

Tey, ið ætla at senda inn, skulu senda til VÆLSKAPT BREK, postbox 2208, 165 Argir.

### Virðislønir og Tíðarætlan

Fløgan skal savna tónlistafólk og yrkjarar og onnur í eini útgávu, sum samstundis stuðlar endamálið. E i n i 10 - 12 løg koma við á fløguna. Tey bestu fáa virðisløn.

1. pláss: 10.000 krónur.
2. pláss: 5000 krónur.
3. pláss: 3000 krónur.

Freistin at lata inn er úti 31. mars.

Tíðarætlanin fyri tiltakið er henda.

Tann 31. mars. Freistin at lata inn til kappingina er úti. Tann 30. apríl: Virðislønir verða latnar vinnarunum. 1. - 31. mai: Innspæling. Fløgan kemur út í august - september..

Dómsnevnd er sett at velja 3 tey bestu løgini. Sjey fólk eru í nevndini, m.a. rithøvundar, tónaskøld, yrkjarar, lærarar og tónleikarar. Tey skulu hvør í sínum lagi geva innkomnu løgunum/sangunum stig í raðfestingini: 20, 15, 10, 8, 6, 5, 4, 3, 2, 1, stig.

Síðani skal dómsnevndin viðgera kappingarúrslitið, áðrenn tað verður almannakunngjørt.

### Heimasíða, konsert og fundur

Ætlanin er at halda útgávudagin við pallborðsfundi, konsert og møguliga øðrum tiltøkum eisini, sum seta kikaran á endamálið við sjálvari útgávuni.

Tey, ið hava hug at vita meira um kappingarreglur og annað, kunnu leita sær á alnótina og á heimasíðuna sangkapping.cjb.net.



*Ria Tórgarð las upp hugvekjandi yrking, ið bar saman tað at fáa eitt brekað barn, við eina broytta ferðaætlan*

## Sum ein broytt ferðaætlan

Stigtakararnir til fløguna og sangkappingina til frama fyri brekað skipaðu fyri tíðindafundi á Hotel Føroyum í gjár.

Fundurin byrjaði við, at sjónleikarin Ria Tórgarð hugtakandi las upp sera hugvekjandi yrking, um hetta at fáa eitt brekað barn.

Yrkingin bar saman við eina broytta ferðaætlan.

Upprunaliga var ætlanin, at ferðin skuldi ganga til Italia. Hugurin sveimaði um gondolir og annað.

Tá avtornaði, lendi flogfarið í Hollandi. Tað var als ikki har, ið ætlanin var at fara.

Men ferðaætlanin var broytt.

So við og við kom tó til sjóndar, at eisini í Hollandi var ymiskt vakurt og vert at leggja til merkis.

# Anker Mortensen í Trap

*Anker Mortensen sýnir fram í Gallarí Trap á Vesturbrúgv í Keypmannahavn.*

DAGFINN OLSEN

Tann 5. februar lat upp framsýning við myndum hjá Anker Mortensen í Gallarí Trap á Vesturbrúgv í Keypmannahavn.

Jørgen Trap-Jensen sigur á innbjóðingarlepanum, at hann fegnast um at kunna bjóða Anker Mortensen vælkomnum í Gallarí Trap, eftir at hava sæð verk hansara hjá Ingálvi, í Rampen og á sýningini »Færøsk kunst på den Frie«.

Umframt myndirnar hjá Anker Mortensen, eru myndir hjá øðrum listamonnum, við tilknýti til Trap, at síggja.

Sýningin á Trap er opin hósdag til sunnudag frá klokkan 12 - 18. Síðsti sýningardagur er sunnudagurin 27. februar 2000



*Maanens Duuer eftir Anker Mortensen. Hann sýnir nú fram á Gallarí Trap í Keypmannahavn*



# Løgmaður kært Heðin fyri formansskapinum

*Sambært løgmanni hevur Heðin Mortensen brotið tagnarskylduna í viðgerðini av uppritinum til ríkisrættarligu samráðingarnar*



*Heðin Mortensen hevur biðið formansskap løgtingsins um loyvi at síggja kæruna frá løgmanni, men tað fær hann ikki fyrr enn formansskapurin er liðugur at viðgera hana*

JOHN JOHANNESSEN

»Í uppritinum eru ov nógvir leysir endar. Vit fáa púra greitt at vita, at tað er fullveldinum, landsstýrið fer eftir. Men vit fáa ikki at vita, hvussu long eins skiftistíð skal vera.«

Hetta segði Heðin Mortensen, tinglimur Sambandsfloksins og limur í uttanlandsnevndini, í samrøðu við mikudagsútgávuna av Dimmalætting í sambandi við fundin í uttanlandsnevndini fyrrapartin týsdagin.

Tá Heðin Mortensen kom við hesari útsøgn, roknaði hann ikki við, at hon fór at fáa avleiðingar fyri hann, tí hetta var ikki meira enn tað, sum fleiri ferðir áður var komið fram í fjølmiðlunum.

Men fyri Annfinn Kallsberg, løgmann, er hetta at fara út um mark. Hann metir prátið hjá Heðini Mortensen við Dimmalætting vera eitt brot á tagnarskylduna í sambandi við viðgerðina av uppritinum til samráðingarnar um ríkisrættarligu støðu Føroya. Tí sendi hann seinnapartin mikudagin løgtinginum skriv, har hann kærir Heðin Mortensen fyri at hava brotið tagnarskylduna. Eisini vísti løgmaður frá tingsins røðarapalli á, at hann metti leka vera í uttanlandsnevndini.

### Panikkur í landsstýrinum

Heðin Mortensen heldur, at kæran um seg heilt greitt sýnir okkum, at tað nú er komin panikkur í landsstýrissamgonguna í sambandi við fullveldismálið. Í sama sambandi vísir hann eisini á almenna brævið, Høgni Hoydal sendi Jóannesi Eidesgaard í vikuskiftinum.

– Tað sýnist, sum landsstýrið roynir at finna nakrar syndabukkar at tveita skuldina á, um fullveldissamráðingar teirra við donsku stjórnina miseydnast. Men eg ætli mær ikki at góðtaka at verða gjørdur til syndabukk, og tí er seinasta orðið ikki sagt frá mínari síðu í sambandi við ógrundaðu kæruna, staðfestir Heðin Mortensen.

– Eg eri endurginvin rætt í Dimmalætting, men tað, sum eg havi sagt, er als ikki nøkur avdúkan av, hvat stendur í uppritinum. Hatta er nakað, almenningurin kann lesa í samgonguskjalinum, í Hvítubók, á Fullveldisheimasíðuni og í kunningarskjalinum, sum er sent fókatingslimum. Tí er tað púra burturvið at ákæra meg fyri at hava brotið mína tagnarskyldu í hesum sambandi.

Heðin Mortensen heldur, at løgmaður og varaløgmaður nú eru farnir at síggja trøll við fleiri høvdum á aljósum degi, tá teir kunnu finna uppá at koma við so mikið ógvusligum skuldsetingum um smálutir, sum teir eru komnir við móti Jóannesi Eidesgaard og sær seinastu vikuna.

### Heldur lekan vera í Tinganesi

Í sambandi við viðgerina av fullveldismálinum eru partar av uppritinum, landsstýrið hevur latið uttanlandsnevndini í trúnaði, vorðnir almannakunngjørdir í fjølmiðlunum.

Men Heðin Mortensen vissar um, at einki skrivligt tilfar er likið út frá honum. Hann vísir tvørturímóti á, at lekin eins væl kann vera í landsstýrinum.

– Vit vita jú, at bæði Hvítabók og Hernaðarfrágreiðingin vórðu almannakunngjørdar í fjølmiðlunum langt áðrenn løgmaður ætlaði sær at almannakunngera tær. Sostætt fekk allur heimurin høvi at seta seg inn í málini, áðrenn tinmenn yvirhøvur høvdu fingið frágreiðingarnar í hendi.

Hetta, heldur Heðin Mortensen, gevur okkum greiðar ábendingar um, at lekin møguliga finnist í Tinganesi, og heldur hann, at løgmaður heldur eigur at leggja seg eftir at finna hendan lekan, í staðin fyri at ógrundað at kæra uttanlandsnevndarlimir.

Heðin Mortensen sigur at enda, at hann metir løgmann hava ein stóran trupulleika at greiða Føroya fólki frá, hvat gongur fyri seg her á landi fyri tíðina.

# Má tryggja samstarvið

*Tingformaðurin skal nú syrgja fyri, at góða samstarvið millum uttanlandsnevndina og landsstýrið verður varðveitt*

AVRIT

Føroya Løgting
Finnbogi Ísakson, formann
Erling Jalsgøtu
100 Tórshavn

Í sambandi við, at uttanlandsnevnd løgtingsins er farin undir at viðgera eitt upprit fi
Føroya Landsstýri um samráðingar við donsku ríkisstjórnina um rættarstøðu Føroya
borið uppá mál í hvønn mun slík skjøl eiga at verða viðgjørd í trúnaði.

Til tess at tryggja viðgerðina í uttanlandsnevndini umframt at tryggja samráðingarstøð
Føroya í mun til Danmarkar hevur landsstýrið avgjørt, at slík skjøl og teirra viðgerð eig
at verða í trúnaði. Hetta er eisini í fult samsvar við galdandi siðvenju higartil viðvíkjan
uttanlandsmálum.

Landsstýrið hevur hóast hetta avrátt at almannakunngera omanfyri nevnda upprit, tá i
uttanlandsnevndin hevur viðgjørt uppritið og svarað landsstýrinum aftur. Sostatt
uppritið framvegis í trúnaði.

Í tíðindablaðnum Dimmalætting í dag verður næstformaðurin í uttanlandsnevndi
endurgivin fyri at greiða frá nevndarviðgerðini av uppritinum. Hann sigur millum anna
hetta:

> *Vit fáa púra greitt at vita, at tað er fullveldinum, landsstýrið fer eftir. Me*
> *vit fáa ikki at vita, hvussu lang ein skiftistíð skal vera.*

Tað er greitt, at hesir upplýsingar eru so mikið ítøkiligir at sigast kann at trúnaðuri
viðvíkjandi hesum skjali og tess viðgerð í grundregluni ikki er virdur.

Til tess at varðveita tað góða samstarv, sum higartil hevur verið millum Føroy
Landsstýri og uttanlandsnevnd løgtingsins fer Føroya Løgmaður við hesum at heita
formansskap løgtingsins um at taka stig til at hesi viðurskifti verða fingin í rættlag.

Vinarligar heilsanir

[signature]

JOHN JOHANNESSEN

Løgmaður sigur í kæruni til løgtingsins formansskap, at tað er greitt, at upplýsingarnir, Heðin Mortensen gav Dimmalætting mikudagin, eru so mikið ítøkiligir, at trúnaðurin viðvíkjandi uppritinum og og tess viðgerð í grundregluni ikki er virdur.

Men fyri at varðveita góða samstarvið, sum higartil hevur verið millum Føroya Landsstýri og uttanlandsnevnd løgtingsins, heitir løgmaður á formansskapin um at taka stig til, at viðurskiftini verða fingin í rættlag.

Í kæruni vísir løgmaður á, at tað er fyri at tryggja viðgerðina í uttanlandsnevndini umframt at tryggja samráðingarstøðu Føroya í mun til Danmark, at landsstýrið hevur gjørt av at skølini í sambandi við viðgerðina og viðgerðin av sjálvum skjølunum, eigur at verða hildin í trúnaði.

Heðin Mortensen góðtekur ikki kæruna, og hevur hann latið málið til sakførara sín, sum hevur sent formansskapinum áheitan um, at Heðin Motensen skal sleppa til hoyring í formansskapinum hesm viðvíkjandi.

## Føroyski happadrátturin

### 1. dráttur
### drigin 14.02.2000

Størstu vinningarnir fullu soleiðis:

| | | |
|---|---|---|
| **30.000 kr.** | 13310 | 1/1 seðil - sølustaður: Havn |
| **25.000 kr.** | 4395 | 1/1 seðil - sølustaður: Eiði |
| **15.000 kr.** | 4755 | 1/1 seðil - sølustaður: Gøta |
| **10.000 kr.** | 979 | 1/1 seðil - sølustaður: Havn |
| **10.000 kr.** | 6345 | 1/1 seðil - sølustaður: Runavík |
| **10.000 kr.** | 6585 | 1/1 seðil - sølustaður: Vágur |
| **10.000 kr.** | 12111 | 1/1 seðil - sølustaður: Vágur |
| **10.000 kr.** | 12536 | 1/1 seðil - sølustaður: Havn |
| **5.000 kr.** | 3120 | 1/2 seðil - sølustaður: Havn |
| **5.000 kr.** | 3132 | 1/2 seðil - sølustaður: Vágur |
| **5.000 kr.** | 3929 | 1/1 seðil - sølustaður: Hvannasund |
| **5.000 kr.** | 5064 | 1/1 seðil - sølustaður: Havn |
| **5.000 kr.** | 6945 | 1/1 seðil - sølustaður: Tvøroyri |
| **5.000 kr.** | 6947 | 1/1 seðil - sølustaður: Havn |
| **5.000 kr.** | 9514 | 1/2 seðil - sølustaður: Havn |

**3.000 kr.**

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1216 | 1881 | 2034 | 2709 | 4042 | 4775 | 5126 | 8964 | 11898 |
| 13897 | | | | | | | | |

**2.000 kr.**

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 173 | 444 | 1388 | 2540 | 3513 | 3571 | 3897 | 4247 | 4462 |
| 4592 | 4846 | 5158 | 5884 | 6395 | 6460 | 7034 | 7282 | 7613 |
| 7660 | 8436 | 8499 | 9181 | 9763 | 12199 | 13881 | | |

**1.000 kr.**

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 169 | 233 | 582 | 656 | 704 | 716 | 877 | 1511 | 1790 |
| 1872 | 2064 | 2116 | 2130 | 2157 | 2473 | 2734 | 2782 | 3448 |
| 3476 | 3503 | 3515 | 3530 | 4516 | 4631 | 4690 | 4756 | 4930 |
| 5022 | 5077 | 5132 | 5241 | 5415 | 5519 | 5593 | 5783 | 5950 |
| 5976 | 6321 | 6461 | 6577 | 6651 | 6680 | 6749 | 6921 | 7754 |
| 7757 | 7883 | 8357 | 8878 | 8969 | 9353 | 9438 | 9464 | 9677 |
| 9718 | 10091 | 10702 | 11063 | 11144 | 11306 | 11337 | 11378 | 11421 |
| 11673 | 11837 | 12045 | 12307 | 12350 | 12390 | 12413 | 12633 | 13948 |

**500 kr.**

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 209 | 465 | 576 | 593 | 648 | 684 | 753 | 778 | 851 |
| 887 | 1128 | 1326 | 1402 | 1618 | 1645 | 1796 | 1904 | 1915 |
| 2145 | 2236 | 2391 | 2425 | 2446 | 2450 | 2512 | 2524 | 2689 |
| 2740 | 2773 | 2839 | 3062 | 3122 | 3141 | 3192 | 3208 | 3219 |
| 3342 | 3385 | 3432 | 3450 | 3451 | 3487 | 3806 | 3967 | 4065 |
| 4099 | 4409 | 4430 | 4648 | 4649 | 4677 | 4738 | 5252 | 5305 |
| 5383 | 5973 | 6087 | 6320 | 6324 | 6487 | 6569 | 6619 | 6719 |
| 7036 | 7151 | 7294 | 7409 | 7416 | 7517 | 7575 | 7795 | 7830 |
| 7936 | 8240 | 8277 | 8283 | 8444 | 8581 | 8718 | 8724 | 8725 |
| 8781 | 8785 | 8807 | 8814 | 9080 | 9128 | 9155 | 9160 | 9170 |
| 9270 | 9640 | 10018 | 10065 | 10187 | 10297 | 10356 | 10461 | 10498 |
| 10635 | 10662 | 10722 | 10930 | 11408 | 11460 | 11774 | 11847 | 11887 |
| 11946 | 12012 | 12594 | 12623 | 12758 | 12776 | 13128 | 13137 | 13159 |
| 13415 | 13480 | 13507 | 13674 | 13685 | 13692 | 13780 | 13800 | |

Vinningarnir verða útgoldnir beinanvegin við frádrátti av 15% gjaldi til landskassan, av tí parti av vinninginum, sum er omanfyri 3.000 kr.
Vinnararnir verða bidnir um at venda sær til happadráttarseljarar sínar.
Vinningur má avheintast áðrenn 6 mánaðar frá dráttardegnum.

**Føroya landsstýri**
14.02.2000
(Happadrátturin)